# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Dyggur smeitur

Tað kom dátt við at frætta, at eldur aftur var í einum av risastóru trolarunum, sum Thorfólkini í Hósvík eiga og reka. Mikudagin í farnu viku bórust tíðindi úr Kyrrahavinum, har Athena var til fiskiskap, at eldur varð umborð. Seinni fræ ttist, at skipari og manning høvdu tamarhald á støðuni. Avrátt varð at sigla til lands at finna fram til, hvussu umfatandi skaðin var. Tá var tað so, at sløkkiliðsfólk frá privatari fyritøku undir ræði av Switzer gjørdu ilt verri, sambart reiðaranum, sum blaðið hevði samrøðu við í gjár. Tey gjørdu ikki mætari enn at lata ilt sleppa at aftur eldrakta økinum, og eldur kom í aftur. Í skrivandi løtu vita vit ikki, hvussu álvarsligur skaðin er, men sambart tíðindaskrivi frá felagnum sunnudagin, stóð skipið ikki til at bjarga.

Vit bíða nú eftir at frætta, hvussu álvarslig støðan er.

Tað var annars í fjør, at Thor gjørdi av at keypa og umbyggja teir tríggjar trolararnar, Poseidon, Hercules og Athenu og gera teir út til fiskiskap í Kyrrahavinum. Tað vildi tó so illa til, at Hercules fyrr í ár varð rakt av herviligum eldi, sum hevði við sær, at skipið alt brendi, men tað, sum verri var, 11 av manningini doyðu. Henda hending skuldi tó ikki standa einsamøll. Nú nakrar mánaðir seinni var aftur eldur í enn einum av skipunum hjá Thor.

Reiðarin og øll onnur standa spyrjandi. Hvussu ber tað til, at eldur kemur í tvey av flaggskipunum hjá eina og sama reiðarí við so stuttum millumbili! Tilvild ella eru aðrar orsøkir? Eldáseting er so altíð ein teoretiskur møguleiki, men helst óhugsandi. Vánaligt arbeiði í sambandi við umbygging? Her hava skipini verið góðkend av Klassa og øðrum eftirliti.

Øll henda óvissa hevur gjørt, at umfatandi tøkniligar og aðrar kanningar vórðu gjørdar umborð á tí triðja risaskipinum, Poseidon, tá tað kom til lands saman við Athenu.

At talan er um ein dyggan smeit fyri reiðarí er eingin ivi um. Hesar hendingar kunnu vera við til at steðga menningini av tí annars vakstrarríka Thor, sum eftir fáum árum hevur ment seg til at vera ein av okkara fremstu fyritøkum. Fyri føroyska trygging eru hesar hendingar eisini skot fyri bógvin. Vónandi eru endurtryggingar, sum taka stóra partin av skaðunum, tó at hetta fer at svíða hjá trygging eins og reiðarií. Vit mugu so bara vóna, at hesi óhapp ikki taka mótið og skapanarhugin frá Thorfólkunum, sum higartil hava prógvað, at har dugnasemi og vilji/treiskni ganga hond í hond, har er ávøkstur.

**Sosialurin**

## Landskassin má rinda



**JØRGEN NICLASEN,**
tingmaður

**Tunlarnir skulu ikki verða pengamaskinur at loysa ósemjur í Tjóðveldisflokkinum**

Bummgjaldið til Norðoyatunnilin er bert at rinda Norðaoyartunnilin við og somuleiðis við Vágatunlinum. Tá tunlarnir eru útgoldnir, verður ókeypis at koyra. Somuleiðis verður við Skálafjarðartunnlinum. Men við Sandoyartunnilin verður nakað øðrvísi. Ferðslan verður væl minni, og tí kann tað ikki løna seg at krevja inn bummpening. Tí má landskassin rinda.

Tað kann ikki koma upp á tal at senda eina skattarokning út til nøkur ávís fólk í landinum, í hesum føri brúkarnar av báðum undirsjóartunlunum. Tunlarnir skulu ikki verða pengamaskinur at loysa ósemjur í Tjóðveldisflokkinum.

**Akfør rinda kostnaðin í dag**

Akfør rinda skrásetingargjald, MVG, avgjøld á brennievni og vegskatt til landskassan. Leggja vit tey tølini saman, rinda akfør væl tað sum viðlíkahald og útbygging av vegakervinum kosta. Sandoyartunnilin er fyrsta stigið suðureftir. Málið er at binda Suðuroynna í miðøkið eisini.

## Kennir tú mynstrið aftur?



**JENIS AV RANA**
Formaður Miðfloksins

Greinin byggir á tíðindir í útvarpi føroya hósdagin 28 juni.

Hoyrdi tú útvarpstíðindini næstseinasta hósdag? Tey vóru sera áhugaverd, beinleiðis margháttligur var tó parturin, ið snúði seg um loftrúm føroyinga. Loftrúmið, sum, so løgið tað ljóðar, verður umsitið av íslendingum, eftir áheitan frá dønum. Millum mangt annað segði útvarpsmaðurin okkum, at:

...eftir øllum at døma verður tað ókeypis hjá føringum at fáa ein nýgjan radara á Sornfelli.

... danir skulu rinda radaran, sum er mettur at kosta eina tíggjutalsmillióna upphædd at byggja.

... líkt er til at danir nú fara nú at taka um endan og seta ein nýggjan radara upp á Sornfelli

Og veitst tú ikki betur, gerst tú rørdur yvir hesa umsorgan dana móti lítlu tjóðini í norðuratlantshavi. Men síðani koma nýggir upplýsingar, vit fáa at vita, at:

...av tí at loftrúmið framvegis er danskt málsøki eru tað danir, ið koma at rinda kostnaðin, men fólkatingið má játta fíggingina, sum síðani verður endurgoldin av IKAO sum er altjóða flogferðslumyndugleikin.

Summa summarum: Mótsatt tí, ið tíðindini løgdu upp til og byrjaðu við, so gjalda danir ikki eitt oyra. Teir játta fígging til eitt øki, sum teir tvíhalda um ábyrgdina av - og enntá hava lutað út til eitt triðja land at umsita. Men hvørt oyra, sum útbyggingin kostar, fáa teir endurrindað frá alheims loftferðslumyndug leikanum.

Kennir tú mynstrið aftur?

Júst sama mynstrið, sum brúkt verður, tá teir víðaribera føringum og grønlendingum part av tí peningi teir, føroyinga og grønlendinga vegna, fáa frá NATO - meðan teir sjálvir inntøkuføra sær sín bróðurpart.

Genialt.

## Viðv. Rhodos, gull og pínligi Høgni

**EILIF BRIMHEIM**

Tað tykir mær løgið, at tú skrivar eina heila blaðsíðu um flagggøluna – tað, at Merkið veittrar undir Dannebrog.

Støðan í hesum landi er nú einaferð so, at so leingi avgerðir verða tiknar á kálki og sandi, lýsir tilburðurin støðuna so einfalda, sum hon er!

Tískil nyttar einki at argast ella válka sær í hesum.

PS. Tú brúkar eini 640 orð at gera viðmerkingar til Høgna og eini 40 orð at rósa ítróttafólkunum. Eg fekk altíð í skúlanum at vta, at ein skuldi halda seg til evnið, sum sipað varð til í yvirskriftini!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.